# Kjakast um levnaðin hjá Berlusconi

Orðalagið var rættiliga hvast, tá italska tjóðartingið í gjár umrøddi privatlívið hjá landsins forsætisráðharra, Silvio Berlusconi. Tingmenn gjørdu serliga nógv burtur úr einari telefonsamrøðu millum Berlusconi og eina kvinnu. Fyri stuttum kom ein upptøka av samrøðuni undan kavi, og sum skilst er innihaldið ikki til fyrimunar fyri politisku støðu forsætisráðharrans. Undir orðaskiftinum funnust andstøðutingmenn hvassliga at Berlusconi, sum varð lagdur undir at oyðileggja umdømið hjá tí politiska valdinum. Tað sama halda nógvir italiumenn, tí meiningakanningar vísa, at forsætisráðharrin er ikki so væl umtóktur, sum hann hevur verið.



# 3000 danir kunnu doyggja av H1N1

Danska heilsustýrið væntar, at H1N1 ella Influensa-A kann fara at kosta munandi fleiri mannalív í Danmark enn upprunaliga hildið. Herfyri metti heilsustýrið, at umleið 1.000 danir kunnu doyggja av sjúkuni, men nú sigur ein talsmaður hjá stýrinum við danska kringvarpið, at sjúkan kann fara at kosta umleið 3.000 dønum lívið, um illa vil til. Sambært danska kringvarpinum vænta bretsku heilsumyndugleikarnir, at H1N1 kann kosta meiri enn 60.000 bretum lívið.



*Kanningararbeiðið hevur drigið nógv út, tí katólska kirkjan hevur mótarbeitt nevndini við hond og fót alla tíðina og hevur gjørt tað, hon er ment fyri at forða kanningararbeiðinum*

*Katólska kirkjan hevur í nógv ár verið mistonkt fyri at fjala út yvir kynsligan ágang móti børnum. Ein nýggj írsk frágreiðing sigur, at 450 børn vórðu misnýtt árini 1975 til 2004, men stuðulsfelagsskaðir siga, at rætta talið helst liggur um 4.500*